# Hava hingið í leysari luft í



**Nú eru meiri enn eitt ár síðani at Natasha Vukotic í Hvalba søkti um at fáa arbeiðsloyvi í Føroyum longt. Enn hevur hon ikki fingið og tí noyðist hon at liva av almannahjálp, hóast hon hevur fleiri tilboð um arbeiði**

ÚTLENDINGAMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg vil so gjarna sleppa til arbeiðis, Men eg sleppi ikki. Tí noyðist eg at liva av almannahjálp, hóast eg havi fleiri tilboð um arbeiði.

Natasha Vukotic í Hvalba er ein av mongum útlendingum í Føroyum, sum eru komin í klemmu.

Tað er nú meiri enn eitt heilt ár síðani at hon søkti um at fáa arbeiðsloyvi í Føroyum. Men hon fekk ongantíð nakað svar. Í mars í ár mátti hon søkja av nýggjum, tí hon hevði skift arbeiðsgevara.

Men hóast innlendismálaráðið í landsstýrinum lovaði at viðgera umsóknina skjótt, hevur hon enn hvørki hoyrt orð ella eið aftur.

– Eg havi ringt og ringt, men tey starvsfólkini, sum hava við mítt mál at gera, eru aldrin at hitta. Eg havi givið teimum mítt telefonnummar og biðið tey ringja aftur, men tey øna mær ikki svar.

Natasha Vukotic veit tí framvegis ikki um hon er keypt ella seld og hvørja lagnu hon og 11 ára gamla dótturin, Vanja, fáa.

Og so seint sum mánadagin mátti hon tískil siga enn eitt arbeiðstilboð frá sær. Hon hevði fingið arbeiði at vaska skúlan í Hvalba upp og niður í summarfrítíðini, men tann møguleikan misti hon eisini.

Sostatt kann Natasha og dótturin ikki gera annað enn at stilla seg upp í kórið av útlendingum í Føroyum, sum hava fingið eina heilt órímiliga viðferð av Føroya Landsstýrið, tí tað kann neyvan koma undir hugtakið rættartrygd at tað skal taka eitt heilt ár at fáa svar frá ovasta myndugleika.

Men hon er eisini greið yvir, at hon er ikki nakað eindømi, tí tað er í heilum, at vit frætta um, at fólk fáa ikki svar.

– Tað tykist eisini sum um at fólk ikki vera viðgjørd eins, tí tað tykist sum um at ítróttarfólk fáa nógv betri sømdir í Føroyum enn aðrir útlendingar.

## Borgarakríggið gjørdi enda á øllum

Natasha Vukotic sigur, at tá ið hon var barn, var sera gott at búgva í Jugoslavia og at fólkið líktust nógv føroyingum.

– Men so kom borgarakríggið og gjørdi enda á øllum. Alt bleiv korrupt og lógloysi fór at gera um seg av álvara so at tú kundi síggja nøkur fólk blíva millióningar upp á onga tíð. Øll hini livdu í størstu neyð og alt gekk út uppá at sætta sær og sínum.

Tá ið Vanja varð fødd í 1994 høvdu vit bara streym seks tímar ísenn og so var sløkt í seks tímar og vit høvdu hvørki varma ella heitt vatn í húsunum.

– Hetta var onki lív at bjóða einum barni, so vit tóku av, tá ið maður min fekk møguleikan at koma til Føroyar at sparka við Roynn í 1997. Tá var Vanja trý ára gomul.

– Hvalbingar tóku ótrúliga væl ímóti okkum og hjálptu okkum í allar mátar.

Tey fóru aftur til Jugoslavia árið eftir, men tá fóru hon og maðurin hvør til sítt.

Hetta var um sama mundi sum NATO fór at bumbað í Jugoslavia, og sum flest øll onnur har um leiðis, høvdu Natasha og tey tað ikki serliga gott hesa tíðina.

– Tað var ikki so nógv hernaðarligt virksemi í býnum, sum vit búðu í. Har brustu bara tríggjar bumbur, sum oyðilegði eina radarstøð og onkur fylgisveinaútgerð hjá herinum.

– Men ongin kann hugsa sær, hvussu tað er at hoyra buldrini av bumbum og kanónum nakað burturi. Eg minnist eisini, at vit onkuntíð fóru útfyri dyr, tá ið vit hoyrdu eitt flogfar yvir høvdinum á okkum og vit spekuleraðu í um fogfarið var á veg at bumba, ella um tað hevði verið og bumbað og tí var vandaleyst.

– Hetta var ein ómetaliga strævin og slítandi tíð og ikki ein tilvera at bjóða einum lítlum barni.

## Ein mynsturintegratión

Tað endaði við at góð vinfólk í Hvalba hjálptu henni við einum ferðaseðili heim til Føroyar og sostatt komu hon Vanja aftur hendavegin í 1999. Hvalbingar høvdu eisini syrgt fyri bæði innivist og arbeiði.

Síðani tá hava Natasha og dótturin búleikast í Hvalba og tey hava ongantíð aftur verið í Jugoslavia og vitjað.

Ì næstsíðstu viku vóru rumensku hjúnini Rapa í Vestmanna tikin fram sum dømi um eina mynsturintegratión í føroyska samfelagnum.

Tað sama má heilt avgjørt sigast um Natashu Vukotic og dóttrina, tí kki skerst burtur, at Natasha hevur verið meiri enn vælkomin í lokalsamfelagnum í Hvalba.

Hon hevur arbeitt, tað hon hevur kunnað. Hon er stóran vinaskara og hon er enntá tvær ferðir staðið gumma at einum lítlum hvalbingi. Er tað ein spurningur um at hjálpa til í Roynhøllini antin at vaska ella at varta upp í eini veitslu, er hon altíð til dystin fús og hon situr javnan dadda fyri ymisk foreldur tá ið brúk er fyri tí. Eina ferð um vikuna venur hon óvitar at spæla flogbólt. Lívrætturin er fyltur lundi, men ræstur fiskur glíður sanniliga eisini væl niður. Skerpikjøt og ræst kjøt er hon ikki so óð eftir, ið hvussu so er ikki um tað er alt ov sterkt.

Hon tosar at kalla flótandi føroyskt og hon hon dótturin tosa føroyskt sínamillum. Og tá ið hon longu sama árið hon kom higar í 1999 fekk høvi at keypa tey lítlu fittu, gulu húsini heilt uttarliga bygdini, var tað ein stórur dreymur, sum varð uppfyltur.

Og tað er ikki dagur, at ikki okkurt av føroysku vinfólkum hennara eru inni á gólvinum.

– Tað einasta, eg vildi, var at fá umstøður til at geva dóttir míni ein tryggan uppvøkstur. Tær umstøðurnar havi eg fingið í Hvalba, tí her er Vanja glað og hevur tað gott. Eg hevði satsað uppá at verða verandi í Føroyum og tað var eisini tí, eg keypti okkum hús at vera í.

Tað sama kann sigast um dóttrina, Vanju. Hon er júst liðug í fjórða flokki í Hvalba, har hon fær tað skoðsmál í skúlanum, at hon er ein framúr dugnaligur og gløggur næmingur. Hon tosar flótandi føroyskt og hevur nógv spælivinir í bygdini. Hon var dansigenta hjá einum sangara í Nósabarnaprixinum, men hon er eisini sera røsk at dansa føroyskan dans. Hon dugir fleiri kvæði og hóast hon bara er 11 ára gomul, dugir hon longu at skipa onkran lítlan tátt og onkra lítla vísu.

– Vanja dugir betri at tosa føroyskt enn hon dugir at tosa sítt egna móðurmál, sigur Natasha. Hon trívist sera væl bæði í skúlanum og ímillum vinir eftir skúlatíð. Tað, sum hon kallar "heim" er húsini hjá okkum í Hvalba. Men í veruleikanum hevur hon búð er so leingi, at hon kennir ikki til nakað annað heim.

Men tað kemur heldur ikki av ongum, at Natasha og Vanja eru fallin so væl til í Hvalba, tí tey hava sjálvi gjørt eitt stórt arbeiðið fyri at gerast partur í samfelagnum.

– Eg helt frá fyrsta degi,